Hús & Heim
snorri@sosialurin.fo



*Rúna Egholm er útlærdur anlegsgartnari, og royndirnar frá hesum fáa kundarnir í Garðsbúðini góða nyttu av*
*Mynd: Bárður*

# Ráð og avrek á sama staði

**Garðsbúðin kann bjóða fólki hent ráð, tá arbeiðast skal í urtagarðinum, ella tá flísar skulu leggjast á**

GARÐSRØKT
*Snorri Brend*

**Hoyvík:** - Tú, hvat skal eg sáa í grasplenuna? Riggar hetta slagið?

Vit eru í Garðsbúðini við Vegin Langa í Hoyvík, har eitt av starvsfólkunum, Rúna Egholm er í ferð við at hampa nakrar av blómunum, ið skulu setast fram til kundarnar at keypa.

Meðan vit práta kemur tann fyrsti kundin inn. Hann hevur í hyggju at gera nakað við grasplenu sína, sum ikki sær ov gott út í summar, og vil tí fegin hava ráð frá Rúnu. Og tey fær hann.

– Eg havi tíverri ikki fingið ta brosjyruna, sum hoyrir til hetta. Men um tú bíðar eitt sindur, so skal eg skaffa tær hesar upplýsingar.

– Teir eru her í eini bók. Eg skal bara kopiera burtur úr henni, - tað tekur mær tvey sekund, sigur Rúna Egholm.

Hetta er triðja árið, hon starvast í Garðsbúðini hjá Balslev, og tað er eitt arbeiði, sum henni dámar sera væl. Serliga hesa tíðina, nú alt byrjar at spretta og spíra

## Ráðgeving eftir árstíðini

Júst hetta við at hava onkran at ráðgeva seg, er nakað sum nógv gera brúk av í Garðsbúðini.

Í slíkum førum er gott at hava ein serkønan á staðnum, tí Rúna er upprunaliga útlærd sum anlegsgartnari og hevur flísar sum serøki. Og spurningarnir hon fær eru flestallir bundnir at árstíðini.

Um várið spyrja nógv fólk um, hvussu tey skulu sleppa av við mosan í grasplenuni. Nú, vit eftir røttum áttu at havt sól og summar, spyr fólk um, hvussu tey gera sær ein urtagarð við blómuteigi og við flísum.

Tá komið er longur út á summarið, og tá fólk byrja at fáa summarfrí, er eitt av høvuðsevnunum, hvussu ein kann gera sær ein hugnakrók í garðinum. Onnur vilja vita, hvussu ein ger leðhegn, har møguleiki kann verða fyri at grilla ein góðveðursdag.

Spurt verður eisini, hvussu ein kann arbeiða við moldini á besta hátt, tá fólk nú hava tíð at arbeiða í urtagarðinum, og hvussu ein ger sær eina grasplenu.



*Krukkurnar eru so líðandi vorðnar sera væl umtóktar millum manna. Tær fáast í fleiri støddum, og væl liggur fyri at planta summarblómur í krukkurnar*
*Mynd :Bárður*

## Krukkur og blómur

Tey seinnu árini eru krukkurnar so líðandi vorðnar alt betri og betri umtókar millum manna. Krukkurnar fáast í mongum støddum, og tí kunnu fólk velja sær júst ta støddina, sum tey ynskja sær.

Nógv seta tær á terassuna heima við hús, og seta síðani eina planting í við 5-6 ymiskum blómum. Og tí er tað sera hugaligt og vakurt hjá fólki at hyggja eftir.

Hinvegin so verða eisini seldar hópurin av blómum, trøum og staudum millum ár og dag. Nógv keypa sær summarblómur, tí tey, her og nú ynskja at prýða okkurt í garðinum heima við hús – til ein føðingardag, í samband við prógvhandan ella til stevnu. Hesar summarblómurnar halda bara tað eina árið.

Tað stuttliga við hesum blómum er, at tær eru føroyskar. Garðsbúðin fær tær nevniliga frá vakstrarhúsunum í Sandavági og á Tvøroyri. Hesar blómurnar eru kortini heldur viðbreknar, tí tær tola ikki at standa í gjóstri, men tær tola hinvegin betri at standa í vindi.

Øðrvísi er við staudunum, sum blóma aftur og aftur, og tí kunnu verða fólki til gleði meiri enn ta einu ferðina.

## Kanna húsini áðrenn innflyting

Norsk tøl vísa, at heili 40 % av nýggjum húsum hava feilir ella manglar, sum ein keypari fyrst sær, tá húsini eru yvirtikin. Tí er neyðugt at brúka góða tíð at fara um húsini frammanundan innflytingini.

Tað er sera týdningarmikið, at tann sum keypir eini nýggj hús gongur gjøgnum tey saman við byggiharranum og entreprenørinum. Alt skal vera eftirhugt.

Við lógini í hondini kanst tú – í Noregi, í øllum førum – krevja, at allir feilirnir verða rættaðir, ella at tú fært avsláttur í prísinum.

Ráðini eru fyrst og fremst galdandi fyri íbúðir og raðhús í størri byggiætlanum. Ert tú sjálvur byggiharri, eigur tú at ansa munandi betri eftir hesum.

Sjónligir feilir á yvirflatum, hurðum og vindeygum kann ein vanliga ikki gera galdandi, eftir at ein er fluttur inn. Brúka tí góða tíð at fara um húsini áðrenn yvirtøkuna, og set krav fram um, at sjálvt teir minstu feilirnir verða bøttir.

Tá tú yvirtekur húsini er týdningarmikið at tú kannar, um feilirnir eru rættaðir nøktandi. Um ikki, so er bara at klaga av nýggjum.

Her er ein listi yvir nøkur av teimum tingunum, sum tú eigur at kanna áðrenn yvirtøkuna av einum bústaði:

- Yvirflatur
- Listar
- Skáp
- Fugur
- Stikk-kontaktir
- Hurðar og vindeygu
- Ljós
- Vatn og wc
- Ventilasjónin
- Ringiklokka
- Um gólv og veggir eru í plan
- Køkin

Góða eydnu við nýggju húsunum!

**sb.**

